VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 20. apríl 2015 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Kommunuskrivstovan |

Møtt: Rósa Samuelsen, Johannes Ellefsen, Egil Petersen, Marin Bláberg, Albert Ellefsen, Jóhannis Joensen og Jógvan S. Hansen.
Dánjal Thomsen, Dánial Johansen, Jonhard Joensen og Marjus Dam høvdu forfall.
Skrivari: Georg Hansen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar

| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 39 | Býarplanur broyting við Stóraklett í Sandavági | 1 |
| 40 | Garður millum MB og Kirkjaveg í Miðvági | 2 |

**2014-41-57**

## 39. Býarplanur broyting við Stóraklett í Sandavági

### Málsfrágreiðing

Kommunustýrið er samt um at broyta vegaføringina til útstykkingina við Stóraklett. Henda vegaføringin er ikki í býarplaninum. Neyðugt er tí at broyta býarplanin.

**Tekniska nevnd, 5. desember 2014, pkt. 9:**

Mælt verður til at broyta býarplanin.

**Býráðið, 15. desember 2014, pkt. 46:**

Samtykt.

Tórfinn S. Simonsen er komin við viðmerkingum til loysnina vegna húskini hjá sær og Sigurd Petersen.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 20. apríl 2015 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Kommunuskrivstovan |

**Tekniska nevnd, 10. apríl 2015, pkt. 60:**

Samtykt at bjóða Tórfinn á fund at tosa um málið.

Umsitingin hevur havt fund við Tórfinn og Biritu, har tey greiddu frá ynskjum sínum. Í høvuðsheitum ynsktu tey, at niðankoyringin til útstykkingina verður flutt longur norður og at vangarnir vera laðaðir á brúnni um Myllánna.

### Avgerð

Samtykt at niðankoyringin til útstykkingina verður flutt longur norður og at vangarnir vera laðaðir á brúnni um Myllánna.

**2014-44-9**

## 40. Garður millum MB og Kirkjaveg í Miðvági

### Málsfrágreiðing

Kommunan hevur latið laða garð millum økið hjá MB og Kirkjaveg. Játtaðar eru tilsamans kr. 408.000,- til arbeiðið. Henda upphæd strekkir til at laða 85 metrar av garði.

Støða skal takast til, um arbeiðið skal enda her, ella haldast skal fram við at laða út til omankoyringina oman á sand.

Um laðast skulu 52 fermetrar afturat, verður kostnaðurin kr. 168.390,-.

Um ljós skal setast á garðin, kostar tað umleið kr. 70.000,-.

**Tekniska nevnd, 10. apríl 2015, pkt. 56:**

Mælt verður til at gera arbeiðið.

**Fíggjarnevnd, 13. apríl 2015, pkt. 44:**

Mælt verður til at játtað kr. 168.390 til liðugtgerð av garðinum og kr. 70.000,- til ljós.

VÁGA KOMMUNA

Tel. +298 34 44 00
Fax. +298 33 34 70
vaga@vaga.fo
www.vaga.fo

Hammershaimbsvegur 1
360 Sandavágur

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 4. Almennur fundur |
| Fundardagur | 20. apríl 2015 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Kommunuskrivstovan |

Peningurin verður tikin av játtan til byggibúning.

**Avgerð**

Samtykt

**Bók lisin Fundur lokin**

Rósa Samuelsen
Dánial Johansen
Jóhannes Ellefsen
Jógvan Sjúrður Hansen
Jonhard Joensen
Jóhannis Joensen
Marjus Dam
Egil Petersen
Marin S. Bláberg
Dánjal Thomsen
Albert Ellefsen